# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo





*Robert James (Jim) Brown, ph.d., professari í jarðalisfrøði, saman við Benadikt Joensen, Heðin Abrahamsen, Fríðrik Heinesen og Bjarni Petersen*

Mynd: Jens Kristian Vang

## M.Sc. á Fróðskaparsetrinum

Á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya hava fýra lesandi staðið útbúgvingina M.Sc. í leitingarjarðalisfrøði. Teir eru: Benadikt Joensen, Heðin Abrahamsen, Fríðrik Heinesen og Bjarni Petersen.

M.Sc. er stytting fyri latínska heitinum *magister scientiarum*, men oftast verður enska heitið Master of Science brúkt. Útbúgvingin er normerað til 2 ára fulltíðarlestur omaná B.Sc.-prógv. Teir fýra hava tikið lesturin afturat arbeiði, so hann hevur tikið nakað longri.

Tað var í 2003, at Fróðskaparsetrið við kunngerð nr. 109 fekk heimild at geva masterútbúgvingar. Hinar deildirnar hava givið nøkur fá prógv síðani; men hetta er fyrstu ferð, at nakar hevur fingið masterprógv á Náttúruvísindadeildini.

Masterritgerðin hjá Fríðrik og Bjarna hevur heitið *Processing of seismic data and design of 3D seismic surveys —Case examples from Kollafjørður, Skopunarfjørður and from the seismic line OF94-029*, og vegleiðari hevur verið Robert James (Jim) Brown, professari á Fróðskaparsetrinum, fyrrverandi professari á universitetinum í Calgary í Canada.

Masterritgerðin hjá Benadikt og Heðin hevur heitið *Magnetotelluric survey from north to south onshore the Faroe Islands*, og vegleiðarar hava verið Jim Brown og Laust B. Pedersen, professari á universitetinum í Uppsala.

**mg**



**Fyri 35 árum síðan:**

## Lærarar í 1975

Í juni 1975 tóku 21 lærarar prógv á Føroya Læararaskúla.

**Fremst .f.v.:** Birita G. Petersen, Vestmanna, Elisa Waag, Tórshavn, Marianna Dahl, Tórshavn, Guðrið Jensen, Tórshavn, Poulina Slættanes, Klaksvík, og Arnfríð Joensen, Toftir.

**Miðraðið:** Ólavur Højgaard, Vestmanna, Trúgvi Jacobsen, Vágur, Zacharias Hammer, Tórshavn, Jógvan Asbjørn Skaale, Tórshavn, Bjarki G. Skúvadal, Vestmanna, Andrass Henriksen, Sørvágur, Niels, J. Petersen, Sandur, Jákup Lindberg, Tórshavn, og Petur Kruse, Sørvágur.

**Aftast f.v.:** Símun Joensen, Gásadalur, Jóannes Joannesen, Dalur, Olaus Jespersen, Hov, Niels J. Nielsen, Vágur, Símun Simonsen, Vestmanna, og Manne Persson, Tórshavn.

*Kelda: árið ið fór 1975*

## Hátíðarhald á Kunoyarnakki í 1972



*Hátíðarhald við fløggum og steypum á Kunoyarnakki í 1972. Á myndini eru f.v.: Jens Juel Sólbjørg, Jóhan Purkhús, Símun Petur Rasmussen og Páll Klettskarð*

Í sambandi við at brøðurnir Sjúrður og Djóni Kunoy leygardagin 6. juni gingu niðan á hægsta fjall á Kunoynni, Kúvingarfjall, at seta upp eina koparplátu við ymiskum sitatum, nevndu vit at ein onnur pláta varð sett upp á Kunoyranakki, norðast á Kunoynni, í 1972. Teir sum hava sítt navn graverað har eru: Jens Juel Sólbjørg, Klaksvík, Páll Klettskarð, Haraldssund, Símun Petur Rasmussen, Haraldssund, og Johan Purkhús, Klaksvík.

Vit hava nú fingið myndir frá hátíðarhalinum, tá tann plátan varð sett upp í 1972. Myndirnar eru úr savninum hjá Johan Purkhús í Klaksvík, ið var ein av teimum, sum hevur sítt navn graverað í plátuna.

**mg**



**Á platuni stendur:**

*Áðrenn fjøllini vórðu til og tú skapti jørðina og jarðarríkið. Ja, frá ævunum til ævirnar ert tú Gud.*

*Tann kraft var ikki kørg, sum bygdi tey í forðum.*

*Ja, handaverk tíni, tey lova tær øll.*

*Hetta minni veri vígt skaparanum av Føroya vøkru náttúru.*

*Á sumri 1972*

*Jens Juel Sólbjørg, Jóhan Purkhús, Páll Klettskarð og Símun Petur Rasmussen*

### Merkisdagar

**75 ára føðingardagur**

Fríggjadagin 18. juni fyllir Mikkjal á Bergi, Klaksvík, 75 ár. Hann er burturstaddur.

**80 ára føðingardagur**

Hósdagin 3. juni fylti Ane Elkjær Hansen á Nesi 80 ár. Føðingardagurin verður hildin í missiónshúsinum á Toftum leygardagin 19. juni frá kl. 12. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**90 ára føðingardagur**

Leygardagin 19. juni verður Solborg Joensen, Leirvík, 90 ár. Tey, ið ynskja at heilsa upp á Solborg, eru hjartaliga vælkomin við Bólstein 4, millum kl. 16 og 19.

**Silvurbrúdleyp**

Týsdagin 15. juni høvdu Nomi Høghamar og Edvard Pauli Ejdesgaard, Eiði, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 19. juni kl. 19 á Gerðisvegi 7. Tey, ið ynskja at gleðast saman við okkum eru hjartaliga vælkomin.